# Vegleiðing til tøku av roðslu og útfylling av brævbjálvum

Á deyða fiskinum skal slipan skavast av, áðrenn roðslan verður tikin; síðani skulu í minsta lagi 30 roðslur skavast av við bakkanum á knívinum oman fyri síðulinjuna, millum ryggfjøðurina og fitifjøðurina, sum víst á tekningini niðanfyri, og á baksíðuni á roðslubrævbjálvanum. Roðslan skal koyrast beinleiðis í brævbjálvan, og ein brævbjálvi skal nýtast til hvønn fisk.

Brævbjálvin skal turkast við stovuhita og síðani sendast inn til okkara. Bústaður og postkrav eru á brævbjálvanum.




<u>Brævbjálvin skal fyllast út soleiðis:</u>

| | |
|---|---|
| **Navn** | Navn á tí, sum hevur fiskað fiskin. |
| **Tlf** | Eitt fartelefonnummar, har tað er møguligt at senda upplýsningarnar um fiskin til, og til lutakastið. |
| **Dato** | Nær fiskurin er fingin (dagur/ár). |
| **Fiskistað** | Áin og bygdin, har fiskurin varð fiskaður. |
| **Slag av fiski** | Sjósíl (**S**), laksur (**L**), ælabogasíl (**Æ**), kúlulaksur (**K**), ella ókent (**Ó**). |
| **Longd** | Heildarlongd verður mátað av fiskinum, t.e. frá kjaft til og við stert, í cm. |
| **Vekt** | Vektin verður máld í grammum. Heildarvektin á fiskinum er ein fyrimunur, men kruvd vekt er eisini í lagi. Viðmerk á brævbjálvan, hvør av vektinum er nýtt: **H** fyri heildarvekt og **K** fyri kruvda vekt. |
| **Lús** | Er nøkur lús á fiskinum, verður talið á teimum skrivað á brævbjálvan. |
| **Kyn** | Kvenn (**Kv**) ella kallfiskur (**Ka**). |
| **Mynd** | Tað hevði eisini verið ein sera stór hjálp um tað er møguligt at taka eina mynd av fiskinum. Myndin/ar kunnu sendast til fiskur@fiskaaling.com. Viðmerk navn, dato, longd, vekt so vit fáa sett upplýsningarnar frá myndunum og brævbjálvunum saman. |

Laksur



© Astrid Andreassen

Síl



© Astrid Andreassen

Ælabogasíl



© Astrid Andreassen

Kúlulaksur
*kallfiskur*



Kúlulaksur
*kvennfiskur*



Roðslan kann siga okkum, hvussu gamal fiskurin var, tá ið hann fór úr ánni, hvussu leingi fiskurin hevur verið á sjónum, hvussu skjótt hann er vaksin, og um hann hevur gýtt. Við einum væl útfyltum brævbjálva eru tit eisini við til at geva okkum kunnleika um hvar og nær, fiskurin varð fingin, og kann hetta verða nýtt til at fáa eina ábending um útbreiðsluna av sjósílum í Føroyum.

Tá ið vit hava lisið roðsluna, fáa tit eitt sms við vitanini, ið roðslan gav okkum.